VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og suðri og stundum regn ella mjørki. Um kvøldið væntandi turt. Hitin millum 12 og 15 stig.



Veðrið hósdagin og fríggjadagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 14 og 17 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Fyrst lot av landsynningi, sunnudagin veksur hann vindin upp í stívt andøvsgul. Lítið ella einki avfall, men mjørki í støðum. Hitin millum 13 og 17 stig.

Guðrun fekk eisini húgvuna

Týsdagin á middegi kundi Guðrun Jacobsen fegnast um enn eina stórhending. Tá fekk hon við einum 10 tali í føroyskum studentahúgvuna á høvdið, hóast sigurin í "Stjerne for en aften" hevur havt við sær, at hon mátti leggja skúlagongdina síðsta hálva árið til viks

STUDENTUR
Dagfinn Olsen

Tummas í Dali, lærari, setti húgvuna á høvdið á songfuglinum, meðan familjan, beiggin Eyðun, pápin Ási og mamman Gitte, fegnaðist um hesa stórhending
Mynd: D. Olsen

Týsdagin klokkan 12 fekk Guðrun Sólja Jacobsen studentahúgvuna á høvdið. Síðsta prøvtøkan var í føroyskum og Guðrun ognaði sær eitt flott 10 tal. Og harvið fekk hon húgvuna á høvdið. Tummas í Dali, lærari, setti húgvuna á høvdið á songfuglinum, meðan familjan fegnaðist um hesa stórhending.

Ein stórhending er tað hjá teimum flestu at fáa studentahúgvuna á høvdið, men hjá Guðruni er gleðin kanska størri, enn hjá teimum flestu.

Tá hon vann kappingina Stjerne for en aften hjá DR, hevði hetta við sær, at Guðrun mátti leggja skúlagongdina til viks. Og tað er ongantíð stuttligt, tá ein gongur 3. árið í miðnámsskúla. Eisini tá orsøkin er ein yrkisleið sum songstjørna á heimsins tónatindum, er hetta hugtungt.

Men Guðrun hevur verið til prøvtøkurnar nú við skúlaársenda, hóast hon síðstu mongu mánaðirnar hevur ferðast aftur og fram millum Føroyar og Danmark í stjørnuørindum, heldur enn at lesa og ganga í skúla.

Guðrun hevur so at siga verið á ferð landanna millum síðani sigurin í stóru donsku sangkappingini. Mánadagin kom hon aftur úr Danmark av sangferð og settist at lesa, fyri at fara upp til prøvtøku týsdagin.

Guðrun er ikki troytt av ferðingini, tí hon hevur vant seg við lívið á ferð.

– Men tað kann vera ringt at halda skil á klokkuni. Í morgun fór eg upp klokkan 6 ístaðin fyri klokkan 7, segði Guðrun áðrenn prøvtøkuna týsdagin, og var annars líka rólig og sinnilig, sum vit kenna hana frá stórsigrinum í Forum.

Týsdagin seinnaart skuldi Guðrun skriva autografar hjá einum sponsori, CN-Wear, og síðani stóð endiliga studentafagnaðurin við familju og vinum á skránni.

Men stjørnuábyrgin kallar aftur og Guðrun er skjótt aftur á ferð og í august er fløgan við Guðruni tøk.

Sosialurin ynskir Guðruni og floksfeløgum tillukku við prøvnum.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	5
Nuuk	12
Qaqortoq	8
Ammassalik	11
Saint John's	19
Halifax	16
Reykjavík	12
Seyðisfjørður	9
Tórshavn	11
Lerwick	10
Aberdeen	16
London	20
Tromsø	13
Bergen	12
Oslo	–
Stokkhólm	20
Keypmannah.	15
Helsinki	19
Moskva	16
Berlin	25
Warzawa	20
Kiev	20
Bukarest	28
Paris	24
Madrid	31
Róm	30
Malorca	38
Athen	–
Malta	28
Tunis	35
Beijing	33
New Dehli	35
Bangkok	32
Jakarta	32
Sydney	14
New York	28
Miami	27
Los Angeles	18
Meksikobýur	22
Panama	–
La Paz	13
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	19

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt lágtrýst, 995 hPa. í útsynning úr Íslandi stendur mestsum í stað og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikunáttina.

Ein hátrýstryggur frá Norðsjónum til Norska Havið stendur mestsum í stað og brúgvaløgini vestan fyri Bretsku Oyggjarnar verða í høvuðsheitum vestan fyri Føroyar.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 23/06 kl. 06⁰⁰– 24/06 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,3°
Minsti hiti máldur í juni: 0,0° Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 1,3 mm – mált frá 23/06 kl. 06⁰⁰–24/06 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juni: 89,7 mm

Vika 25 – 22. juni

1. Centrum:
37 - 58 - 74 - 41 - 68 - 59 - 11 - 23 - 07 - 15 - 54

1. Ramme:
18 - 35 - 38 - 02 - 27 - 60 - 71 - 28 - 14 - 75 - 36 - 17 - 61 - 05 - 22 - 47 - 13 - 44 - 26 - 06 - 65 - 20 - 03

Fuld plade:
53 - 52 - 46 - 70 - 10 - 51 - 67 - 40 - 62 - 08 - 43 - 30

Fri spil: **_OXE_**

Fuld plade:	1. pr.	**248.079,- kr.**
1. Ramme:	2. pr.	**42.797,- kr.**
1. Centrum:	3. pr.	**21.413,- kr.**
Ramme:	4. pr.	**301,- kr.**
Centrum:	5. pr.	**42,- kr.**

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

VESTFALLSKYRRINDI

21. juni: Seinna kvarter
25. juni: Mánin longst frá jørðini
29. juni: Tendring

Kelda: Almanakkin 2003

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
25. juni	04.21	16.41	03.21	15.41	03.36	15.56	06.21	18.41	07.21	19.41	02.36	14.56	01.36	13.56	04.36	16.56	05.36	17.56	04.06	16.26	05.21	17.41
26. juni	05.01	17.21	04.01	16.21	04.16	16.36	07.01	19.21	08.01	20.21	03.16	15.36	02.16	14.36	05.16	17.36	06.16	18.36	04.46	17.06	06.01	18.21
27. juni	05.42	18.04	04.42	17.04	04.57	17.19	07.42	20.04	08.42	21.04	03.57	16.19	02.57	15.19	05.57	18.19	06.57	19.19	05.27	17.49	06.42	19.04
28. juni	06.26	18.48	05.26	17.48	05.41	18.03	08.26	20.48	09.26	21.48	04.41	17.03	03.41	16.03	06.41	19.03	07.41	20.03	06.11	18.33	07.26	19.48

5 707265 100036 >